**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 22. mars 2012**

Møtt: Otto West,Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Herdis Jensen,
Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.
Niels Olaf Eyvindsson er burturstaddur.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um stuðul frá Alzheimerfelagnum.** | Til 1:<br>Samtykt varð ikki at stuðla tiltakinum. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um stuðul til verkætlan frá Brikolasj.** | Til 2:<br>Samtykt varð at kanna málið nærri til komandi fund. |
| **Mál 3:**<br>**Umsókn um stuðul til fløguútgávu frá Lív Næs.** | Til 3:<br>Samtykt varð ikki at stuðla fløguútgávuni. |
| **Mál 4:**<br>**Umsókn um stuðul til keyp av ljóðførum frá Tvøroyrar Hornorkestri.** | Til 4:<br>Samtykt at heita á tey um fyrst at royna at savna inn pening sjálvi. Hinvegin vil komm-unan stuðla onkuntíð við at biðja tey spæla og veita teimum samsýning afturfyri. |
| **Mál 5:**<br>**Umsókn um stuðul til trivnaðarkanning av arbeiðsleysum í Føroyum / Hvalba.** | Til 5:<br>Samtykt varð ikki at stuðla kanningini. |
| **Mál 6:**<br>**Skriv frá borgarum um gøtuljós.** | Til 6:<br>Samtykt varð, at Tekniska nevnd kannar, hvussu ljósið er við húsini. |
| **Mál 7:**<br>**Til ummælis - umsókn um umbýti millum matr. nr. 9a og 9c í Hvalba.** | Til 7:<br>Samtykt varð at viðmæla umbýti. |
| **Mál 8:**<br>**Tekningar av arbeiðshúsi til kirkjugarðin í Hvalba.** | Til 8:<br>Samtykt varð, at Tekniska nevnd saman við borgarstjóranum fer út at hyggja. |
| **Mál 9:** | Til 9: |

| | |
|---|---|
| **Umsókn um byggiloyvi til garð á matr. 462ab í Sandvík.** | Samtykt varð at viðmæla grannaloyvi, eins og samtykt varð at geva byggiloyvi út frá givnum upplýsingum og at Tekn. nevnd fer á staðið. |
| **Mál 10:**<br>**Skriv / mótmæli viðv. nýggju byggisamtyktini.** | Til 10:<br>Viðv. tí eina mótmælinum, har sethúsaøki er broytt til landbúnaðarøki, er hent eitt mistak, ið verður rættað. Viðv. hinum mótmælinum, varð samtykt at kanna hetta nærri. |
| **Mál 11:**<br>**Skriv frá borgarum í Sandvík um ymiskt í Sandvík.** | Til 11:<br>Samtykt at siga frá, at roynt verður at fáa hesar ymisku umvælingarnar gjørdar. |
| **Mál 12:**<br>**Lántøka.** | Til 12:<br>Samtykt at taka lán kr. 5.000.000,-. |
| **Mál 13:**<br>**Tilboð frá Ansni uppa kameraskipan til Hv. havn og ruskplássið.** | Samtykt at kanna hetta nærri - Rúni Thomsen tekur sær av hesum. |
| **Mál 14:**<br>**Umsókn um stuðul til barnatiltak á Tvøroyri frá dagrøktarum í Hvalba.** | Til 14:<br>Samtykt varð at stuðla teimum við kr. 2.000,-. |